## Ultras fingið búmerki

Fjeppararnir hjá Víkingi hava fingið nýtt búmerki, nú GÍ og LÍF hava lagt saman. Navnið Ultras,s um GÍ fjeppararnir hava brúkt, er tey varðveitt, men nú hava tey fingið eitt búmerki, sum er meira í tráð við nýggja navnið hjá felagsliðnum hjá leirvíkingum og gøtumonnum. So er spurningurin, hvussu Víkingafjeppararnir fara at lata seg í til dystirnar hjá Víkingni í Formuladeildini.

## Tveir føroyingar í Køge

Nú kappingin í donsku 1. Deild stendur fyri framman hevur Køge, sum øll hini liðini, sett nøvn á spælararnar, sum skulu manna hópin hjá felagnum næsta hálva árið. Millum teir, sum eru í hópinum, eru tveir føroyskir spælarar. Tað eru bakkarnir Jónas Tór Næss og Jóhan V. Gunnarsson, sum báðir eru U21 landsliðsspælarar hjá Føroyum. Jónas spældi í fjør við AB og Jóhan við B36. Venjari hjá Køge er Henrik Larsen.

# Tór-Ingar aftur í Vágum

**Kappingarnevndin valdi at forbarma seg, og so er Tór-Ingar Akselsen til reiðar at tørna út fyri 07 Vestur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tór-Ingar Akselsen gjørdi í vetur avtalu við nýggja samansetta felagið 07 Vestu. Eitt umsitingarligt mistak bar tó við sær, at spæliloyvið hjá spælaranum ongan tíð varð flutt úr HB.

Reglurnar hjá Fótbóltssambandinum staðfesta, at flytingarvindeygað læt aftur tann 22. februar, men ein ventilur er tó, at Kappingarnevndin kann loyva frávikum undir heilt serligum umstøðum.

Og 07 Vestur fekk viðhald í, at talan var um heilt serligar umstøður.

- Grundgevingarnar eru, at leikarasáttmálin er innsendur í november 2007 í upprunaliga felagnum, og í januar 2008 í samanlagda felagnum. Misskiljing millum feløgini var orsøkin til, at umbønin um flytan av leikaraloyvi ikki var innsend rættstundis, skrivar FSF á heimasíðu sínari.

Formaður í Kappingarnevndini er Sveinur Tróndarson. Hann ásannar, at hetta kann eggja øðrum feløgum, sum møguliga hava ein spælara á hondini, at søkja um undantaksloyvi. Men hann heldur samstundis, at úrskurðurin hesa ferð er rættiliga greiður.

- Tað er jú einki sum helst, sum hevur verið krógvað í hesum málinum. Longu í fjør heyst varð boðað frá, at spælarin skifti felag. Í skiftinum frá FSV04 til 07 Vestur fall júst hetta spæliloyvið tó imillum av misgávum. Men har eingin, sum hevur ivast í, hvar spælarin skuldi. FSF hevur góðkent tveir sáttmálar upp á spælaran, og talan er ikki um nakra ósemju av nøkrum slag millum HB og 07 Vestur.

- Tí kann hetta ikki sammetast við eina støðu, har eitt annað felag brádliga kemur við einum øðrum spælara, sum teir nú vilja hava góðkendan. Vit fingu eisini eina løgfrøðiliga meting av málinum, áðrenn vit gjørdu endaliga úrskurðin, og tann metingin stuðlar eisini avgerðini, sigur Sveinur Tróndarson.



*Talan var um heilt serligar umstøður, og tí hevur Kappingarnevndin játtað at gera frávik í reglunum um spælaravindeyga*

# NSÍ vann stórsteypadystin

**Tá EB/Streymur misti Mikkjal Thomassen, gjørdist talan um stórsigur til NSÍ í stórsteypadystinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyska útgávan av Charity Shield var um vikuskiftið, tá meistararnir úr NSÍ og steypavinnararnir úr EB/Streymi dystaðust.

Tað kostaði EB/Streymi dýrt, at teir allan 2. hálvleik vóru noyddir at spæla við tíggju monnum í steypadystinum ímóti NSÍ í dag.

Fyrri hálvleikur var málleysur, og einki bendi á, at munurin skuldi gerast serliga stórur. Í síðstu sekundunum undan hvíldini varð EB/Streyma miðvallarin Mikkjal Thomassen rikin av vølli, og í 2. hálvleiki var munurin eyðsýndur millum teir tíggju í EB/Streymi og teir ellivu í NSÍ, sum vunnu 4-0

Jónhard Frederiksberg skoraði til 1-0 í 57. minutti, og tíggju minuttir seinni økti Óli Hansen til 2-0. Tað restaðu trettan minuttir, tá ið innskifti Øssur Dalbúð økti til 3-0, og í 80. minutti skoraði Sjúrður Jacobsen til 4-0.

Hesi bæði liðini verða mett at skula teljast millum teirra, sum fara at stríðast í toppinum í landskappingini í ár. Fyrsta umfarið í tí kappingini verður síðsta vikuskifti í mars.



*Meistararnir endaðu greitt omaná, tá stórsteypadysturin var á skránni á kvinnudegnum*

Mynd: Sofus D. Johannesen

# Kristoffur Jakobsen úttikin

**Mikkjal Thomassen úr EB/Streymi hevur givið avboð til dystin í Íslandi. Í hansara stað er úttikin Kristoffur Jakobsen**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Kristoffur Jakobsen var í farna kappingarári ein av stuðulsleikarunum hjá KÍ. Miðvallarin stóð seg sera væl, og frálíku avrikini vóru millum annað orsøk til, at hann var til royndarvenjingar í IL Hødd fyri tíð síðan.

Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, hevur eisini varnast dugnaligu fótbóltsevni hansara. Mikkjal Thomassen hevur givið avboð til landsdystin í Íslandi tann 16. mars, og í hansara stað kemur Kristoffur Jakobsen. Klaksvíkingurin hevur í hesu undankappingini verið fastur í byrjunaruppstillingini á U-21.

# Søguligur dystur í Íslandi

**Talan verður um fyrsta landsdyst nakrantíð innandura í Íslandi, tá ið Føroyar um eina viku fara at vitja íslendska fótbóltslandsliðið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurn.f*

Um eina viku – sunnudagin 16. mars – fara Føroyar at spæla fyrsta landsdystin í 2008. Hann verður í Íslandi.

Grannauppgerðin verður søgulig. Hetta verður fyrsta ferðin nakrantíð, at íslendska a landsliðið fer at spæla landsdyst innandura. Spælt verður í fótbóltshøllini Kórnum í Kópavogi, har fyrsta bríksliðið verður klokkan 16. Føroyar hava eina ferð áður spælt landsdyst innandura. Tað var 31. januar í 2001, tá ið Føroyar og Svøríki spældu málleysan javnleik í NM kappingini, sum tá var á skránni. Dysturin varð spældur í fótbóltshøll í Växjö í Svøríki.

Íslendska liðið er ikki úttikið enn. Ólafur Jóhannesson, landsliðsvenjari, fer at boða frá liðnum mikudagin. Talan er ikki um altjóða leikdag, og tí fer íslendska liðið at verða mannað við spælarum úr íslendsku kappingini.

Íslendskir fjølmiðlar hefta seg við, at tað á føroyska liðnum eru fleiri, sum áður hava royndt seg í íslendskum fótbólti. Símun Samuelsen er nú aftur í Keflavík, og so verða nevndir Rógvi Jacobsen, sum áður hevur spælt við KR, Fróði Benjaminsen sum hevur spælt við Fram, og hjálparvenjarin Jens Martin Knudsen, sum bæði hevur spælt við Leiftri og ÍA.